**9.fl. í Tofta skúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 5/2010: Uppskot til samtyktar um at fáa fleiri ung í aldrinum 14 til 20 ár í arbeiði**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Heitt verður á landsstýrið um at skipa fyri meira arbeiði til ung í aldrinum 14 til 20 ár.

**Viðmerkingar:**
Vísandi til tað stóra arbeiðsloysið, sum ger seg galdandi í Føroyum og serliga hjá teimum ungu, verður heitt á myndugleikarnir um at skipa so fyri, at ung fólk í aldrinum 14 til 20 ár fáa møguleika at fáa eitt arbeiði. Mett verður, at tey ungu í dag hava ov lítið at gera. Meira enn helvtin ganga arbeiðsleys og sita oftani bara heima og einki gera. Ung fólk eru nom og eisini liggur ein góður menningarmøguleiki í hesari óbrúkti arbeiðskraft. Tað er eggjandi fyri tann føroyska ungdómin at vera virkin og hava møguleika fyri at vinna sær egnu løn, eins og hetta kann geva eitt gott íkast til teirra menning. Í hesum krepputíðum er tað sera torført fyri ung fólk at fáa arbeiði. Tí metir 9 flokkur í Tofta skúla, at tað er umráðandi, at landsstýrið skipar fyri neyðugum broytingum, so at fleiri ung fólk í Føroyum kunnu fáa arbeiði.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Julia Clementsen Vónbjørt Johannesen Fríði Dam

Martin Neslíð Anna Simonsen